FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Almanna- og Mentamálaráðið
Eirargarður 2
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 27.10.2025
Ummælistíð: 10.10.2025
J. nr. (MEGD): 701-10-2025
J. nr. (AMMR): 25/25038

Hoyringarskriv
til uppskotið til verklagslóg til sambýlið við Rygsá

MEGD fegnast um at Autismufelagið hevur verið hoyringarpartur í allari tilgongdini og fyri at MEGD eisini hevur fingið høvið at luttaka sum hoyringspartur. Vit takka samstundis fyri høvið at senda hoyringarskriv til nevnda uppskot til verklagslóg, sum vónandi verður samtykt í Løgtinginum. Sum kunnugt krevur tað serkunnleika at byggja til fólk við breki, eitt nú við atliti til atkomu, trivnað og menning hjá borgarum. Byggiserkunnleikin tekur tíð og orku at menna, og viðkomandi vælferðarskipanir og tænastur skulu eisini samskipast m.a. millum geirar. Av hesum orsøkum vil MEGD eisini gera vart við at ein heildarætlan eigur at verða orðað, sum m.a. ásetur viðkomandi mál, skipan fyri serkunnleika og háttalag fyri eitt nú samskipan millum viðkomandi geirar. Hetta kundi verið við til at tryggja at almennar byggiverkætlanir til fólk við breki á rímiligan hátt verða skipaðar í samsvari við altjóða brekrættindasáttmálan,[1] og hevði helst eisini styrkt grundarlagið fyri at menna góðar og burðardyggar loysnir eitt nú í mun til starvsfólkatrotið og framtíðar vælferðartænastur. Sum tað minsta eigur tørvurin á eini heildarætlan at vera kannaður nærri.

Mælt verður til at samtykkja uppskotið

1. Hetta uppskot til verklagslóg tykist væl úr hondum greitt og tekur m.a. góð og viðkomandi atlit til teir borgarar við autismu, ið eftir ætlan fara at húsast við Rygsá. MEGD hevur nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til ætlanirnar at byggja til fólk við breki, men bara eina viðmerking í mun til ítøkiliga innihaldið í uppskotinum, sí niðanfyri. MEGD mælir samanumtikið løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Viðmerking um ítøkiliga innihaldið

2. Uppskotið sigur einki um *taktil* leiðbeiningar- og vegleiðingarmerki, sum kunnu verða hent fyri fólk, ið eru blind ella sjónveik. Hesar tillagingar eiga at verða framdar á rímiligan hátt, og eiga ikki at gera ov stórt inntriv í karmar og gerandisdag hjá fólki, ið hava autismu. Sum dømi kundi gelendarar

[1] Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. (Brekrættindasáttmálin) LM-162/2008. Skjal 1. Sí eisini *Bekendtgørelse af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

at hava *taktila* uppmerking, ið ikki órógvar, og serlig atlit eiga at verða tikin til at gólvleiðbeiningar ikki órógva húsfólk, ið hava autismu. Bæði húsfólk við autismu og avvarðandi/vitjandi kunnu fáa ágóða av tí taktila. Við virðing fyri húsfólkinum við autismu, og teirra tørvi, verður mælt til at fáa taktil leiðbeiningar- og vegleiðingarmerki við í uppskotið.

Yvirskipaðar viðmerkingar

3. Enn er eingin almenn trivnaðarkanning ella vitanar- ella granskingargrundað orsøk ella grundgeving fyri júst hví tað gevur meining at byggja stórar bústaðareindir, eitt nú orsaka av starvsfólkatroti. Sera umfatandi gransking[2] og royndir[3] geva greiðar ábendingar um, at smærri eindir eru meiri virðiligar bæði fyri borgarar og starvsfólk, serliga tí hesar í størri mun forða fyri stovnsgerð og í størri mun kunnu tryggja rættindi til sjálvstøðugt lív. Við støði í hagtølum og gransking eigur at verða grundgivið væl fyri, hví og hvussu tað verður bygt í komandi árini. Tíð og orka eigur at verið sett av fyri at hoyra MEGD og limafeløgini á munagóðan hátt í sambandi við yvirskipaðu og langtíðar byggiætlanirnar. Hendan tilgongd hevði havt grundleggjandi týdning, eisini fyri at tryggja burðardygd í framtíðar vælferðarskipanum.

Stovnsgerð (*institutionalisering, stórrakstur*) eigur ikki einans at síggjast í mun til eitt nú fysiskar karmar, stødd á bústaði og umstøður. Atlit eiga eisini at verða tikin til *ósjónlig* og *skipanarlig* viðurskifti, eitt nú:

- Mannagongdir, menniskjasliga nærveru og virksemi í gerandisdegnum.
- Fakligheit, trivnað og starvsfólkaorku.
- Hugburð og samskifti millum starvsfólk og borgarar.
- Ítøkiligar gerandisuppgávur sum til dømis hugna, matgerð og annað gerandisvirksemi.
- Visitering: Borgarar, ið fara at húsast undir sama taki, mugu trívast og mennast saman, og atlit eiga at verða tikin til at finna javnvág og samljóð millum tørvin hjá ymiskum borgarum.

MEGD fegnast um at lógaruppskotið sambært punkti 2.8 um *Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar*, á s. 5, verður mett til at vera eitt stig á leiðini til at lúka viðkomandi ásetingar í breksáttmálanum, her undir týðandi grein 19 um *at liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið* og grein 28 um *nøktandi lívskor og almannavernd*. Yvirskipaðu ætlaninrnar áttu eisini at umrøtt avbjóðingar og møguligar loysnir í mun til aðrar viðkomandi greinar, m.a. grein 9 um *atkomu*, her undir ásetingar um *algild snið*,

[2] Sí eitt nú *The right to home of my own*. Nordic Centre for Welfare and Social Issues. 2015; *Boligvalg og retten til et selvstændigt liv for mennesker med handicap*. Institut for Menneskerettigheder. 2021; Improving quality of life outcomes in supported accommodation for people with intellectual disability: What makes a difference? Bigby, C., & Beadle-Brown, J. (2018). Journal of Applied Research in Intellectual Disabilities, 31(2), 182-200; Granskingarsavnið hjá European Network of Independent Living (ENIL), www.enil.eu/research-papers-and-reports;

[3] Grein hjá MEGD um at limafeløgini kunnu økja um burðardygdina í vælferðarsamfelagnum og styrkja búskaparliga haldførið, eitt nú í sambandi við bygging. www.megd.fo/news/735/limafelogini-styrkja-buskaparliga-haldforid. Grein hjá MEGD um fyrimunirnir við smærri eindum: Smátt er gott. www.megd.fo/news/665/smatt-er-gott.
UN Guidelines on deinstitutionalization, including in emergencies (2022). CRPD/C/5. EU Guidance on independent living and inclusion in the community www.deinstitutionalisationdotcom.files.wordpress.com/2022/12/eu-guidance-on-independent-living-and-inclusion-in-the-community-2-1.pdf

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

grein 25 um *heilsu* og grein 26 og *menning og endurmenning*, grein 30 um *at vera uppi í mentanarlívi, ítrivi, frítíðarlívi og ítrótti* og grein 31 um *hagtals- og dátuinnsavning*.

Tað krevur serkunnleika at byggja til fólk við breki, eitt nú við atliti til atkomu, trivnað og menning hjá borgarum. Byggiserkunnleikin tekur tíð og orku at menna, og viðkomandi vælferðarskipanir og tænastur skulu eisini samskipast m.a. millum geirar. Av hesum orsøkum vil MEGD eisini gera vart við at ein langtíðar virkisætlan ella heildarætlan eigur at verða orðað, sum m.a. ásetur viðkomandi mál, skipan fyri at menna serkunnleika og háttalag fyri eitt nú samskipan millum viðkomandi geirar. Hetta kundi verið við til at tryggja at almennar byggiverkætlanir til fólk við breki á rímiligan hátt verða skipaðar í samsvari við altjóða brekrættindasáttmálan, og hevði helst eisini styrkt grundarlagið fyri at menna góðar og burðardyggar loysnir eitt nú í mun til starvsfólkatrotið og framtíðar vælferðartænastur. Sum tað minsta eigur tørvurin á eini langtíðar ætlan at verið kannaður nærri.

Sum liður í eini heildarætlan eigur at verða kannað nærri, um eitt nú Landsverk kann menna serkøna vitan innan størri byggiverkætlanir, ið antin fult ella lutvíst eru ætlaðar fólki, ið bera brek. Um hendan serkøna vitan innan t.d. atkomu, rímiligar tillagingar og algilt snið (*universal design*), varð tøk hjá Landsverki, hevði helst ikki verið neyðugt at ment vitanina frá grundini av hvørja ferð ein nýggj stór almenn byggiverkætlan verður sett í gongd, umframt at hetta hevði gagnað limafeløgunum hjá MEGD í sera stóran mun og kundi helst munandi lætt um hoyringargongdina. Bæði fíggjarligir og praktiskir fyrimunir høvdu verið við slíkari serkønari vitan, serliga nú tørvur er á at byggja nógvar nýggjar bústaðir komandi árini innan brekøkið.

Vinaliga vegna MEGD,

Ása Olsen
forkvinna

Bárður Atlason sheim
aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo